# Nú verður lættari hjá brekaðum at sleppa inn í almennar stovnar

**– Tað almenna skal ganga undan at tryggja at eisini rørslutarnað sleppa inn í almennar bygningar, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður**



*Hjá rørslutarnaðum hevur tað í nógv ár verið eitt hjartamál, at tað eru so nógvir almennir stovnar, sum tey ikki sleppa inn í fyri trappum og høgum gáttum. Nú tekur tað almenna sær so um reiggj á hesum øki*

ATKOMUMØGULEIKAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal tað verða lættari hjá rørslutarnaðum at sleppa inn í almennar bygningar, bæði hjá landi og kommunum.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum arbeiðir í løtuni við at broyta lógir og reglugerðir soleiðis, at hvørja ferð land og kommunur byggja ein bygning, umbyggja ein bygning, ella leiga ein bygning, skulu tey syrgja fyri at leggja soleiðis til rættis, at eisini rørslutarnað hava fría atgongd til hann.

– Tað, sum liggur í hesum, er, at tað almenna gongur á odda at tryggja rørslutaraðum atkomumøguleikar í hús og bygningar, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur hann hevur fingið undirtøku frá landsstýrinum at arbeiða víðari við málinum, tí hetta er eitt mál, sum umfatar fleiri málsøki í landsstýrinum, ikki minst landsstýrismannin í vinnumálum, sum umsitur Landsverk og landsstýrismannin í innlendismálum, sum umsitur kommununar.

## Bæði land og kommunur

– Fyri kommunurnar snýr hetta seg heilt ítøkiliga um, at landsstýrismaðurin í innlendismálum skal seta tað treyt í lógina um býarskipanir og byggisamtyktir, at rørslutarnað skulu hava tryggjaðan atkomumøguleikar, tá ið kommunur byggja nýtt, umbyggja ella flyta í annað høli.

Fyri bygningar hjá landinum snýr tað seg ítøkiliga um, at gera eitt rundskriv, sum tryggjar rørslutarnaðum atkomumøguleikar, tá ið landið og stovnar undir landinum byggja nýtt, byggja um ella leiga eitt høli.

– Í hesum rundskrivi skulu eisini ítøkiligar vegleiðingar um, hvussu hesir atkomumøguleikarnir skulu vera.

Hans Pauli Strøm sigur, at hvørja ferð tað almenna t.d. leigar ein bygning, skal leigusáttmálin sendast Landsverki sum síðani skal tryggja, at treytirnar til atkomumøguleikar hjá rørslutarnaðum, eru loknar. Hann sigur, at hann nú fer at senda innlendismálaráðnum og vinnumálaráðnum formlig boð um hetta og so verður arbeitt víðari við tí.

## Raðfrest fremst í ein mansaldur

Sum sagt fer hetta at tryggja rørslutarnaðum atkomuøguleikar í allari nýbygging, umbygging og hvørja ferð nýggj høli verða leigað.

Bygningar, sum longu eru, verða ikki broyttir.

– Tað hava vit gjørt fyri at seta gongd á málið á ein hátt sum ikki kostar nakað. Skulu allir almennir bygningar broytast, kann tað gerast kostnaðarmikið og tí hava vit gjørt av at byrja við øllum, sum verður bygt, umbygt og leigað hereftir. Tá ið tað er gjøgnumarbeitt, kunnu vit fara eftir restini so við og við, sigur landsstýrismaðurin.

At tryggja rørslutarnaðum atkomumøguleikar til almennar bygningar og almenn støð, er eitt mál, sum meginfelag teirra brekaðu hevur arbeitt við í eitt lítið mannaminni.

Hans Pauli Strøm sigur, at fyri hálvum árum síðani fekk hann eitt álit um eina virkisætlan fyri ein brekapolitikkk.

– Í tilmælinum, sum fylgdi við álitinum, vóru netupp atkomumøguleikarnir hjá brekaðum til bygningar og støð, raðfest allarfremst.

Hann hevur eisini havt fund við Meginfelag teirra Brekaðu, har tey sóknaðust eftir, nær nakað fer at vera gjørt fyri at tryggjað rørslutarnaðum atkomumøgular til bygningarog støð.

Og tað verður tað so nú, sigur Hans Pauli Strøm.

HVÍTVØRUR
damor



**LG amerikanaraskáp**
Í hvítum við aluminiumhandtøkum. Ísmaskina við ísklumpun, knústum ísi og køldum vatni. Vegna minibarrina nýtist ikki at koyra hurðina so ofta upp, so tú sparir orku. LCD display við temperaturstilling. Sjálvavrímandi í bæði køli og frystiskápinum.
15.998,-



**Gorenje vaskimaskina**
sum er sera væl bygd og tekur heili 6 kg. Hevur elektroniska stýring. Hevur nógv framkomin programmir, m.a. hondvask og enzymfasuvask. Maskinan hevur 3D rustfría stáltrumlu.
tilboð einans
3.998,-



**Bosch køksmaskina**
av tí góða, gamla slagnum. Hon er vælegnað til allan bakstur, eisini breyð og tekur heili 6,3 litrar. Hon er eisini tryggjað á tann hátt at hon hevur yvirhita sikring, sum ger at hon ikki brennur yvir. Nógv tilhoyr fæst til, m.a. kjøtmaskina. Motorurin er so sterkur at tað ger ikki mun at elta rugbreyðsdeiggj til fleiri breyð.
tilboð einans
2.498,-



**Blomberg turkitrumla**
sum er sera løtt at brúka. Hon hevur stórt lúkuop og tekur 6 kg av klæðum. Ljós er í trumluni, og trumlan er rustfrítt stál. Maskinan er reverserandi (koyrir báðar vegir) og hevur sensorar, so at hon steðgar av sær sjálvum tá klæðini eru so turr sum tú vilt hava tey at vera. Hon nógv ymisk turkiprogrammir. Maskinan hevur barnasikring.
tilboð einans
4.298,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor